# Kjølurin til nýggja Smyril strektur í vár

**– Tað gongur støðugt framá við ætlanini at byggja nýggja suðuroyarferju ístaðin fyri Smyril. Ætlanin er at skrivau ndir sáttmálan um ársskiftið so at kjølurin kann verða strektur fyrst í komandi ári**

SUÐUROYARSIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*



*Eini 130 fólk vóru og lurtaðu, tá ið umboð fyri Strandferðsluna, projekteringsfelagið, Knud E. Hansen vóru í Suðuroy saman við landsstýrismanninum í vinnumálum og greiddu frá um nýggju suðuroyarferjuna. Tey, sum høvdu orðið, tóku øll undir við ætlanini*

Tað gongur støðugt framá við ætlanini at byggja nýggja suðuroyarferju ístaðin fyri Smyril.

Hóskvøldið var almennur fundur í Suðuroy, har landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, umboð fyri Strandferðsluna og umboð fyri danska felagið, Knud E. Hansen, sum hevur projekterað skipið, greiddi fólki frá, hvussu nýggja skipið fer at síggja út og, hvussu tað gongur við ætlanini.

Tað var stórur áhugi fyri fundinum og tey umleið 130 fundarfólkini fingu eisini at vita, at nú var gongd av álva komin á málið.

Og tey hoyrdu eisini bæði landsstýrismannin í vinnumálum og stjóran á Strandferðsluni lovað suðuroyingum, at teir skulu ikki leggjast á málið, men gera, hvat teir kundur fyri at fáa tað avgreitt so skjótt, sum yvirhøvur gjørligt.

Málið er nú komið hartil, at Strandferðslan hevur sent einum 20 skipasmiðjum kring allan heimin tilfar um nýggja skipiðvið fyrispurningi um, antin tey eru áhugað at vera við í kappingini um at byggja tað.

Tá ið tær hava svarað aftur, verður meiri útgreinað tilfar sent teimum, har tær eisini skulu meta um, hvatr skipið fer at kosta at byggja.

– Síðani verða nakrar skipasmiðjur tiknar burturúr, sum meiri nágreiniligar samráðingar verða við og soleiðis verður hildið á, til bara ein skipasmiðja er eftir, sum endaligur byggisáttmáli so verður skrivaður við.

Á fundinum varð upplýst, at ætlanin var at undirskriva endaligan byggisáttmála um ársskiftið, so at skipasmiðjan kundi strekkja kjølin í fyrsta ársfjórðingi næsta ár.

Tað hildu hvørki landsstýrismaðurin ella strandferðslustjórin skuldi verið nakað til hindurs fyri.

Byggitíðin verður mett at taka gott tvey ár so ætlanin er, at skipið skal verða klárt at seta í suðuroyarsiglingina á sumri í 2004.

## Fyri landsstýrið týsdagin

Løgtingið hevur áður samtykt at byggja eitt nýtt skip fyri 240 milliónir.

Men nú skipið eftir øllum at døma fer at kosta 300 milliónir, verður neyðugt at fáa tingið at góðkenna tað.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, fer tí at leggja eina verklagslóg fyri tingið um at fáa heimild til at skriva undir byggisáttmála sambært tí endurskoðaðu ætlanini um nýtt suðuroyarskip.

Hann sigur, at uppskotið til verklagslóg er liðugt og tað verður lagt fyri landsstýrið til viðgerðar á fundi týsdagin. Síðani verður tað lagt fyri tingið.

Ongin væntar tó, at trupulleikar vera av at fáa lógina samtyktar, tí yvirhøvur hava teir ymsu flokkarnir tikið ímóti ætlanini við vælvild, hóast talan er um størstu, einstøku, almennu byggiætlan í Føroya Søgu nakrantíð.

–Hetta er ein stór ætlan, men eg vóni, at hon fer at tryggja framburð og trivnað í Suðuroynni og at skipið fer at sjóða oynna tættarari saman við landinum annars, enn hon hevur verið, segði Bjarni Djurholm.

Annars kunnu vit stutt endurtaka, at nýggja suðuroyarferjan er 135 metrar long, hon tekur 200 bilar og hon siglur 21 míl.

Vit koma at hava meiri frá fundinum í onkrum komandi blaði

# Eru heilt forsyndaðir inn á Karsten Hansen

**Tað er nú greitt, at Landsstýrið fær heldur ikki undirtøku frá fyri langtíðar útbyggingarætlanini, sum ætlanini. Nú kann Karsten Hansen spara sær ómakin, sigur Hans Pauli Strøm úr javnaðarflokkinum**

ÚTBYGGINGARÆTLANIR
*Áki Bertholdsen*

– Karsten Hansen hevur spilt møguleikan fyri at fáa breiða undirtøku í Løgtinginum fyri langtíðarútbyggingarætlanini hjá sær.

Hans Pauli Strøm, tingmaður fyri javnaðarflokkin, sigur, at hann er so forsyndaður inn á Karsten Hansen, at nú kann fígjarmálaráðharrin akkurát tað sama kann spara spara sær at royna at fáa javnaðarflokkin at taka undir við ætlanini.

Frammaundan hevur sambandsflokkurin gjørt heilt greitt, at hann tekur ikki undir við ætlanini Og nú eisini javnaðarflokkurin meldar pass, er tað greitt, at landsstýrið fær ikki breiða undirtøku í tinginum fyri ætlanini.



*–Nú má Karsten Hansen sigla sín egna sjógv, sigur Hans Pauli Strøm, tingmaður furi javnaðarflokkin*

## Hildin fyri gjøldur

Hans Pauli Strøm dylir ikki fyri, at hann heldur seg ikki sørt hildnan fyri gjøldur av Karsten Hansen.

– Fíggjarmálaráðharrin hevur fleiri ferðir lagt dent á, at hann ætlaði at fáa so nógvar flokkar sum gjørligt í tinginum at taka undir við verklagsætlanini, sum er løgd fyri tey næstu 10 árini og hann hevur givið øllum tað fatan, at hann fór at bjóða andstøðuni upp í arbeiðið at gera eina langtíðar verklagsætlan.

–Men enn hava vit ikki hoyrt eitt einasta orð frá landsstýrismanninum. Vit hava ikki fingið eitt tal, ikki eina innbjóðing. Og nú eru bara 10 dagar eftir, til uppskotið til fíggjarlóg fyri 2002 fer til prentingar og har stendur verklagsætlanin í.

–Samstundis eru fjølmiðlar dag um dag farnir at endurgeva burturúr ætlanini, heilt niður i smálutir.

Hans Pauli Strøm sigur, at tað tí er greitt, at landsstýrismaðurin hevur spilt sær møguleikan fyri at fáa undirtøku frá javnaðarflokkinum fyri ætlanini.

– Nú er tað ov seint so nú kann hann spara sær ómakin, sigur hann.

Hann sigur, at tað er sjálvagt, at javnaðarflokkurin fer ikki at góðtaka eina verklagsætlan, sum flokkurin ikki hevur havt høvi til at ávirka.

Hann leggur tó dent á, at hetta stendur fyri hansara egnu rokning, tí javnaðarflokkurin hevur ikki viðgjørt málið.

Men hann ivast tó onga løtu í, at flokkurin hevur somu støðu.

Hann heldur eisini, at tað var spell, at tað skuldi enda so.

– Javnaðarflokkurin hevði boðað frá alment, at hann var sinnaður at samstarva við landsstýrið um eina langtíðarverklagsætlan.

– Men treytin var sjálvsagt, at vit fingu eitt veruligt høvi at gera okkara ávirkan galdandi.

– Javnaðarflokkurin vil sjálvsagt vera við til frá fyrsta degi at ávirka, hvørjar útbyggingar skulu gerast tey næstu árini.

Hann vísir eisini á, at ein verklagsætlan, sum ikki hevur undirtøku frá tí mesta av løgtinginum, hevur lítið virði, tí hon bindur fleiri komandi løgting og landsstýrið og eru ikki flest allir flokkar við, verður hon heldur ikki framd.

## Sína egnu ætlan

Hann sigur, at javnaðarflokkurin fer nú ístaðin fyri at gera sína egnu verklagsætlan fyri at geva sítt boð uppá, hvussu útbyggingar skulu fremjast.

Hann kann ikki siga nakað ítøkiligt um, um hvussu hon fer at síggja út.

– Men tað er greitt, at vit fara at leggja dent á at byggja tey øki út, sum er harðsligaforsømd, eitt nú eldraøkið, heilsuverkið, samferðsluna og skúlaverkið.

Vegna javnaðarfeløgini á Tvøroyri lýsir Føroya Javnaðarflokkur til fundar í matarhøllini í skúlanum á Tvøroyri sunnudagin 9. september klokkan 15. Skrá: Samanlegging av feløgunum

**Føroya Javnaðarflokkur**



# Stígur komin í grundlógina

**Stórur partur av grundlógarnevndini er samdur um, at grundarlagið undir grundlógararbeiðinum er so mikið nógv broytt, at ikki ber til at halda fram eftir arbeiðssetninginum at gera eina grundlóg fyri fullveldið Føroyar. Nevndin fer at heita á Høgna Hoydal, um at fáa nýggjan arbeiðssetning**

GRUNDLÓG
*John Johannessen*



*Jóan Pauli Joensen, formaður í grundlógarnevndini, fer helst fyrsta dagin at boða Høgna Hoydal frá, at nevndin ikki longur kann arbeiða eftir tí setningi, hon upprunaliga fekk – at gera grundlóg fyri fullveldið Føroyar*

Alt bendir á, at arbeiðið at gera eina føroyska grundlóg fyribils verður lagt á hillina.

Nevndin metir nevniliga ikki, at tað er grundarlag fyri at halda fram at arbeiða eftir tí arbeiðssetningi, grundlógarnevndin upprunaliga varð sett til at virka eftir.

Uppgávan hjá nevndini hevur verið at fyrireika eina grundlóg til Føroyar sum fullveldi. Men nú halda partar av nevndini, at hetta liggur so mikið langt frammi, at tað ikki ber til at arbeiða eftir hesum arbeiðssetningi fyrr enn eitt løgtingsval hevur verið og støðan er avklárað.

## Nýggjan setning

Grundlógarnevndin hevði fund fyrrpartin fríggjadagin. Á fundinum viðgjørdi nevndin nakrar niðurstøður, sum formaðurin var komin til út frá skrivligum viðmerkingum, sum hann hevði biðið limirnar gera.

Formaðurin gjørdi greitt, at nevndin ella partar av nevdini, er samd um at boða landsstýrismanninum í sjálvstýrismálum frá, at mett verður, at grundarlagið fyri grundlógararbeiðinum í royndum er broytt og heita á hann, um at broyta arbeiðssetningin og møguliga lógina, um tað verður hildið neyðugt.

Men spurningurin er, um landsstýrismaðurin við lógarmálum, Høgni Hoydal, vil broyta setningin, soleiðis at grundlógarnevndin ikki longur hevur sum fyrsta endamál at gera eina grundlóg fyri fullveldið Føroyar. Tí kann tað í ringasta føri henda, at grundlógarnevndin fyribils leggur arbeiðið frá sær.

## Einki uppskot

Sum er, hevur nevndin freist til 1. oktober, til at orða eitt fyribils uppskot til eina føroyska grundlóg. Men nevndin er komin til ta niðurstøðu, at hon metir hetta ikki vera fakliga ráðiligt. Í staðin skal skjýtur nevndin upp, at landsstýrismaðurin fær eina nágreiniliga statusfrágreiðing fyrstu dagarnar í oktober.

Grundlógarnevndin heldur tó, at tað við broyttum arbeiðshátti og øktari arbeiðsmegi kanska kann bera til at halda freistina til 31. desember, men at hetta neyvan er hugsandi, tá havt verður í huga, at almennar hoyringar eisini skulu vera.

Tí vil nevndin hava landsstýrismannin at broyta arbeiðssetningin og tíðarfreistina fyri einum endaligum áliti, soleiðis at nevndin fær stundir at gera eitt dygdararbeiði á høgum fakligum støði, sum fólkið eisini fær tíð til at ávirka og taka til sín.

# Vit eru á konserferð

**Fólkini aftanfyri fløguútgávuna, Vit eru glað, fara á konsertferð seinni í hesum mánaðinum. Tey fara at spæla í Suðuroy, Sandoy og í Vágum**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Børnini og ungfólkini, sum syngja sangirnar á útgávuni, Vit eru glað, fara seinni í hesum mánaðinum at hava nakrar framførslur.

Leygardagin 22. september verða tey í Øravík, sunnudagin 30. september syngja tey í høllini á Giljanesi, og leygardagin 6. oktober er bygdarhúsið í Skopun á skránni.

Á konsertini verða sangir av fløguni at hoyra, og ein dramabólkur er at framføra tvey drama. Harafturat verður ymiskt annað á skránni.

Útgávan, Vit eru glað, hevur fingið góða móttøku kring landið.



*Leygardagin 22. okt. verður konsert í Øravík, har sangir av fløguni »Vit eru glað« verða spældir*

